# longur

her. Annars er áhugi hansara eisini at læra seg meiri um teldur.

Her í tilhaldinum eru fleiri farteldur og ein borðtelda, og tær skuldu gjarna verðið brúktar. Mikudagur er nevniliga teldudagur.

– Eg ætli mær at læra meg eitt sindur um teldurnar. Vita, um tað riggar.

– Ein er væl aldri ov gamal til at læra nakað nýtt, ha?!

Svar uppá spurningin fær hann ikki, tí nú verður rópt á hann:

– Kom nú, Hjalmar! Nú fara vit at byrja, sigur henda kvinnan, Óluva av navni.

Hjalmar drekkur tað seinasta úr koppinum, og er so til dystin fúsur.

Tey eru fýra rundan um borðið, so tey kappast móti hvørjum øðrum, tvey og tvey saman. Hesa ferð eru tað menninir móti kvinnunum.

– Vit klára altíð eini 2-3 popp-spøl ein slíkan dag.

– Tað er so gott at røra seg!, sigur Óluva.

## Vikuskráin fyri Sóljuna

**Mánadagin:** Kl. 14: Fimleikur. Kl. 16: Sangur
**Týsdagur:** Kl. 9:30: Gongutúrur. Kl. 11: Vit lesa bløðini. Kl. 12: Døgurði
**Mikudagur:** Kl. 13:30: Telda
**Hósdagur:** Kl. 10: Fimleikur. Kl. 11: Telda. Kl. 13:30: Vit lesa bløðini.

Drekkamuður er at fáa hvønn dag. Møguleiki er at gera ynsikt handarbeiði, spæla kort, bobb, kánus o.a. Bløðini eru altíð til taks. Hvønn dag enda vit við andakt og sangi.



Hetta umfarið av whistinum var ikki so áhugavert, tí allir høvdu nolað. Men hugaligir eru teir



Hóast ein er lammaður í aðrari síðuni, so finnast hent hjálpitól til hansara, ið dámar at spæla kort



– Mær dámar væl at binda. Og ein góður drekkamunnur er heldur ikki at forsmáa, sigur 78 ára gamla Óluva Dalsenni (vinstrumegin á myndini)

# – Her er altíð onkur at práta við

**Hvørja ferð tilhaldið er opið fer Óluva Dalsenni frá húsum. – Her er gott at vera, og her hittir ein altíð onkran at práta við, sigur henda 78 ára gamla kvinnan**

ELDRAHUGNI

**Klaksvík:** – Í dag havi eg sett mær trý ting fyri: Eg ætli mær at binda, fáa mær ein góðan drekkamunn og so spæla nøkur popp. Telduna, hana tosi eg minni um.

– Ja, og so práta vit sjálvandi eisini nógv, sigur 78 ára gamla Óluva Dalsenni úr Klaksvík.

Hon er ein av teimum trúføstu í tilhaldinum, og kemur higar fýra ferðir um vikuna.

Henni dámar sera væl at røra seg. Og er veðrið gott, so gongur hon bæði frá húsum og aftur til hús síni á Skáltavegi.

– Tað tekur ein hálvan tíma hvønn vegin. So slíkar dagar fái eg nógva motión og nógva fríska luft.

– Vit trena til at ganga gjøgnum Norðoyatunnilin, sigur henda kvinnan, sum aldur illa sæst á.

Dagin fyri høvdu hon og fleiri onnur frá tilhaldinum verið ein gongutúr í býnum.

Teimum, ið dáma at ganga túrar, sleppa tað so ríkiliga!

Óluva Dalsenni hevur havt sína føstu gongd her í tilhaldinum tey seinastu fimm árini.

Hon er sera fegin um henda møguleikan at hitta onnur.

– Eg eri einsamøll í húsi, og tí er gott at koma higar fyri at hitta onnur. Her er altíð onkur at práta við.

– Og er man heldig, so kann man eisini fáa okkurt nýtt mynstur at binda frá hinum, sigur hon.

At henni dámar væl at binda, er skjótt at staðfesta. Stokkarnir ganga so týttir, samstundis sum hon prátar við hinar kvinnurnar við borðið.

– Jú, hetta tilhaldið er alletiders, sigur hon.

**Til Bergens**

Tilhaldið í Klaksvík hevur fasta skrá hvørja viku. Men av og á gera tey kortini ymiskt, sum ikki stendur á hesi skránni.

Nógv av teimum eldru síggja í løtuni fram til dagøarnar 16. til 20. mars. Tá fer tilhaldið nevniliga eina ferð til Bergens.

Tekningarlistin er komin á veggin, og har standa í løtuni 16 nøvn. Men tey vænta, at tá avtornar verða tey helst eini tríati í tali.

– Um eg fari við? Sjálvandi geri eg tað, sigur Óluva.